# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit góvu stjórnini eina nýggja freist, men stjórnin stóð við sítt, og tí hava vit avrættað ein gísla afturat* (Taleban).

# Vindorka og onnur varandi orka skaðilig fyri umhvørvið

**Vindmyllur, sólorkustøðir og biobrennið krevja so stór øki, at tey gera størri skaða enn gagn, sigur amerikanski granskarin Jesse Ausubel. Og hann er ikki einsamallur um ta áskoðanina**

**ORKA**
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Jesse Ausubel heldur, at tað er einki minni enn ein vanlukka fyri umhvørvið, um vit velja at brúka avarandi orkukeldur til at nøkta okkara orkutørv. Eftir hansara tykki høvdu vit oyðilagt umhvørvið, um vit skuldu fingið orkuna frá vindmyllum, vatnorkuverkum, biobrenni ella øðrum varandi orkukeldum.

Amerikanski granskarin hevur ikki tikið sína staðfesting úr leysum lofti, tí drúgvar kanningar liggja aftanfyri. Millum annað hevur hann kannað, hvussu nógv veruliga fæst burtur úr teimum alternativu orkukeldunum.

- Hvør einasti bilur, sum skal koyra við biobrenni, skal brúka ein hektar ella 10.000 fermetrar av dyrkaðum lendi, og skal USA fáa sína elorku frá vindmyllum, mugu vit seta vindmyllur á hvønn einasta blett í statinum Texas. 100 fermetrar av lendi geva bara streym til tvær lampur. Tað sama er galdandi fyri sólorku, tí eisini har er neyðugt við ovurastórum økjum, um tað skal gera nakran mun, skrivar amerikanski granskarin millum annað í einari grein í tíðarritinum International Journal of Nuclear Governance, Economy and Ecology.

Jesse Ausubel haldur, at heimurin eigur at leggja størri dent á kjarnorku heldur enn á varandi orkukeldur.



*Jesse Ausubel er deildarleiðari á Rockefeller University í New York*

- Kjarnorka er grøn og hevur nógvar og stórar fyrimunir fram um aðrar orkukeldur, skrivar hann í greinini og vísir á, at veðurlagspallborðið hjá ST, IPCC, vísir eisini á kjarnorku sum eina møguliga loysn á orkutørvinum.

### Heldur kjarnorku

Sambært amerikanska granskaranum hava tey flestu eina gamla og skeiva uppfatan av kajrnorku og kjarnorkuverkum, og hesum tekur kunningarstjórin á Institutt for energiteknikk í Noregi, Viktor A. Wikstrøm, undir við. Hann vísir á, at tað ber als ikki til at samanbera tey nýggju kjarnorkuverkini við tey gomlu.

- Finnlendingar byggja í løtuni eitt kjarnorkuverk, sum er bygt soleiðis, at tað fær onga ávirkan á umhvørvið, um eitt fullsett jumboflogfar dettur niður á verkið, sigur Wikstrøm. Hann vísir eisini á, at burtursæð frá vanlukkuni í Tjernobyl hava kjarnorkuverkini kring heimin ikki elvt til nakra stórvegis umhvørvisdálking.

Norski kunningarstjórin vísir eisini á, hvussu ovurhonds nógva orku eitt kjarnorkuverk kann framleiða. Eitt nú kann tað nýggja finska verkið framleiða 1,3 terrawattímar.

- Skuldu amerikanarar fingið somu orku burtur úr vindmyllum, máttu teir fylt ein triðing av øllum Norðuramerika við myllum, sigur Viktor A. Wikstrøm, sum er samdur við Jesse Ausubel í, at varandi orka er alt ov plásskrevjandi.

- Í londum sum India, Kina og Brasil er tað púra vónleyst at tosa um at nøkta orkutørvin við varandi orkukeldum, sigur hann.

### Gott við orðaskifti

Norski veðurlagsgranskarin Idar Barstad heldur, at ætla norskir myndugleikar at fremja stórar útbyggingar á orkuøkinum, eiga teir at hugsa um kjarnorkuna sum eina loysn, tí hon hevur sínar fyrimunir.

- Kjarnorka dálkar sera lítið, og við at leggja dent á kjarnorku sleppa vit undan at seta stórar vindmyllulundir fram við strondini, sigur Idar Barstad. Sjálvur heldur hann, at tað er skilagott at brúka kjarnorku, til onkur uppaftur betri loysn kemur undan kavi.

- Vit eiga at tosa um hesi viðurskiftini, tí sum er skúgva politikararnir bara trupulleikarnar undan sær, sigur veðurlagsgranskarin.

# Framtíðar ferðamannaflogfarið

**Saman við rúmdarumsitingini NASA hevur Boeing gjørt tær fyrstu royndirnar við einum heilt nýggjum ferðamannaflogfari**

Nýggja flogfarið, sum hevur fingið navnið Blended Wing Body, er gjørt soleiðis, at tað tekur luft inn undir seg, soleiðis at tað alla tíðina roynir at sleppa uppeftir ella at halda sær uppi, og tað ger, at flogfarið sparir brennievni, sigur Boeing. Ein annar týðandi fyrimunur er, at flogfarið larmar nógv minni enn tey vanligu flogførini, sum vit kenna í dag.



*Blended Wing Body skal í fyrsta umfari brúkast til hernaðarlig endamál, men fer kanska at flúgva við ferðafólki seinni*

Skrokkurin á nýggja flogfarinum minnir nógv um amerikanska bumbuflogfarið B2-Spirit, og Boeing sigur, at í fyrsta umfari er ætlanin at brúka tað nýggja flogfarið til ymsar hernaðarligar uppgávur. Men felagið leggur afturat, at tað er als ikki óhugsandi, at BWB eisini fer at flúgva við ferðafólki eina ferð í framtíðini. Nær tað verður, dugir felagið ikki at siga, men keldur í flogídnaðinum siga fyri AP, at tað verður ikki fyrr enn í fyrsta lagi um tjúgu ár.

**STUTT SAGT**

## Samstarva við ST

Norðurkoreonsku myndugleikarnir hava samstarvað væl við kjarnorkuserfrøðingar hjá ST, sum eru farnir til Norðurkorea at halda eyga við, at norðurkoreanar steingja reaktorin á kjarnorkuverkinum Yongbyon, soleiðis sum stjórnjin í Pyongyang hevur lovað. Eftirlitsmenninir hjá ST hava verið í Norðurkorea síðani tann 12. juli, og leiðari teirra, Adel Tolba, letur væl at samstarvinum við norðurkoreanar. Aftur fyri at lata teaktorin aftur hevur Norðurkorea fingið tilsøgn um matvørur og olju frá sínum grannalondum og USA.

## Ókendur eftirmaður

Í Russlandi hevur varaforsætisráðharrin Sergej Narysjkin, sum er lítið kendur, fingið starv sum ovasti fyri allari sivilari og hernaðarligari skipabygging. Politiskir eygleiðarar í Moskva siga, at við hesum fær Narysjkin munandi størri ávirkan og myndugleika, enn hann hevur havt, og tað eru tey, sum halda, at hetta kanska er eitt stig á leiðini, til at hann verður forsetavalevni, tá Vladimir Putin fer frá næsta ár. Higartil hevur annars verið roknað við, at Sergej Ivanov, verjumálaráðharri, er sjálvskrivaðursum forsetavalevni og eftirmaður hjá Putin.

## Flutt undan eldi

Myndugleikarnir á Gran Canaria hava flutt meiri enn 2.000 fólk frá húsi og heimi orsakað av stórum skógareldum. Higartil eru umleið 40 ferkilometrar av skógi farin upp í royk, og eldurin hevur kravt eitt mannalív. Nógvur hiti og vindur darva royndini at sløkkja eldin.